

Gode Wind-myllurnar verða settar upp. Mynd: A2SEA

# DONG selur vindmylluognir

**Jógvan Hugo Gardar**

15.09.2015 - 14:02

Oljan.fo

DONG Energy heldur fram við ætlanini um at sleppa sær av við ognir sum fyritøkan hevur í vindmylluætlanum. Sambært Berlingske Business er hetta ein partur av nýggja fíggjarkervinum hjá fyritøkuni.

DONG Energy hevur selt 50 prosent av partabrøvunum í týsku havvindmylulundini Gode Wind fyri 5,8 milliardir krónur.

Keypari er Global Infrastructure Partners. Størsti eigari í hesum felagnum er týska tryggingarfelagið Talanx.

Vindmyllulundin kemur at umfata 55 Siemens vindmyllur, tá lundin eftir ætlan skal byrja at framleiða streym í 2016.